## DAGSINS MEINING

### Ein dagur til umhugsingar

Í dag er ST-dagur, og verður hesin dagur, 24. oktober, hildin um allan heim. Endamálið við at hátíðarhalda ST-dagin er at minna á tann stóra týdning, ið ST hevur fyri heimsins fólk. ST er ein felagsskapur av londum, har eisini Føroyar vónandi ein dag gerast sjálvstøðugur limur. ST, ið hevur virkað í gott og væl hálvt hundrað ár, hevur havt stóran týdning fyri heimsfriðin og fyri humanitert arbeiði kring heimin.

Tað humanitera arbeiðið fevnir um hjálp og stuðul til flóttafólk, matvøruætlan, barnahjálpararbeiði og mentanarsamstarv, eitt nú stríð móti analfabetismu. Teir ymsu ST-stovnarnir reka flóttafólkalegur, býta út mat, veita illa støddum børnum hjálp, tryggja børnum í fátøkum londum skúlagongd o.m.a. Hetta virksemið hevur ikki bert havt humaniteran týdning, soleiðis skilt, at talan er um at lætta um hungur og hall. Hetta virksemið hevur eisini í sjálvum sær ein friðarvarðveitanandi virkning. Har kríggj hava verið, er ST til reiðar við friðarvarðveitandi herliðum at tryggja frið, lóg og landaskil.

Men tungt er at reka ST og sera striltið gongur hjá ST at útvega nóg mikið at peningi til virksemið. Sum dømi um hesar trupulleikar kann vera nevnt, at altjóða pressan so seint sum í gjár bar tey døpru tíðindi, at ST hevur verið noytt at minka matvøruhjálpina í Angola niður í eina helvt. Hetta merkir, at milliónir av fólki mugu hjálpast við eina ransón, sum frammanundan var mett at vera í minna lagi. Hesi fólk eru flýdd orsakað av tí borgarakríggi, ið herjaði í Angola í 20 ár. Annað dømi, sum kann verða nevnt, er, at mett verður at umleið 120 milliónir av børnum í Triðja Heiminum fáa ikki ta mest neyðturviliga skúlagongdina. Tey læra hvørki at lesa ella skriva. Hetta merkir, at øll hesi børn frá barnsbeini eru dømd at gerast taparar. Onnur børn í milliónatali koma als ikki til skúlaaldur orsakað av sjúkum, mattrotið og fátækdømi. Afturat hesum kemur, at 12 milliónir av børnum hava ongan góðan orsakað av eyðkvæmi.

Okkara navnframi rithøvundur Heðin Brú kallar í einari av sínum frálíku søgum fátækdóm fyri helvitis urt. Ríki og framkomni parturin av heiminum kann ikki longur sita hendur í favn, meðan hendan urt breiður seg. Stórir partar av mannaættini líða hungur og hall og uppvaksandi ættarliðum trýtur tey mest grundleggjandi mannarættindi sum føði, klæði og útbúgving. Hetta óskil kann ikki halda fram, tí nóg mikið er til øll – tað skal bara býtast javnari enn gjørt verður í dag.

Hesi viðurskifti áttu at givið okkum, sum eru so heppin at búgva í einum av heimsins ríkastu londum, nakað álvarsamt at hugsa um. Hvussu meta vit her um ST? Er tað ikki uppá tíðina, at vit fara undir at veita eins nógva menningarhjálp og ríku grannar okkara her í Norðurlondum? Hvussu hava vit tað við liva við øllum hesum? Og eru nógvir av okkara trupulleikum ikki luksustrupulleikar? Kunnu vit ikki átaka okkum okkara sjálvsøgdu ábyrgd og skyldu, eins og ríku grannar okkara hava gjørt í áratíggjur?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

### Viðmerking til greinina »Hurðin gloppar fyri semju«

**f/ Sjálvstýrisflokkin**
*Kári P. Højgaard*



Tað var við áhuga ein settist at lesa greinina, har Ingi Rasmussen blaðmaður hevur samrøðu við samgongutinglimin Poul Michelsen, men má viðganga, at innihaldið ikki varð tað, ein hevði væntað.

Allir 6 politisku flokkarnir, sum eru umboðaðir í løgtinginum eru eisini við í grundlógararbeiðinum. Eitt eru allir samdir um og tað er, at virði av grundlógararbeiðinum er tengt at breiðari politiskari semju.

Eitt orðafelli sigur:" Grasið er altíð grønari hjá grannanum". Sjálvsagt hevur hvør tingmaður loyvi at droyma um sína "idealsamgongu" og ivist eg ikki í, at allir føroyingar høvdu ynskt sær eina breiða politiska samgongu, har hvør tinglimur ikki varð avgerandi atkvøðan.

Trupuleikin við fíggjarlógarviðgerðini 2002 og 2003, var ikki við Sjálvstýrisflokkinum. Tað ber tað til, eisini at nýta ultimativu loysnirnar, um flokkar hava eitt, sjey ella átta umboð.

Einasta málið sum Sjálvstýrisflokkurin nýtti boksihandskarnar fyri at verja, var ætlanin um at broyta prístalsreguleringina av pensjónum frá verandi 4% um árið til 0,9 og varð hetta stríðið í samgonguni, ikki í løgtinginum.

Nú eru ikki so nógvir smáir flokkar, so eg meti, at tinglimurin eisini sipar til Sjálvstýrisflokkin, (íð er fimti størsti flokkurin), tá hann sigur. **Hvør maður er avgerandi atkvøðan hjá samgonguni, og tí ber til í tíð og ótíð at hótta við at taka sín stuðul aftur. Fíggjarlógin var tað bera møsn og kegl, har serliga teir smáu flokkarnir hóttu við sliti, um teir ikki fingu sín vilja.**

Fari at biðja Poul Michelsen um at greiða frá, hvussu ofta Sjálvstýrisflokkurin í samgongusamstarvinum ikki hevur livað upp til givin lyftir í samgonguskjalinum og í hvørjum føri, Sjálvstýrisflokkurin hevur hótt við sliti ?

Hvørjar hóttanir um at taka stuðulin til samgonguna aftur eru aktuellar í løtuni, og hvørjum flokkum úr samgonguni koma tær frá ?

### Verður barnaansingartrupulleikin loystur?

**Elin Lindenskov**
*býráðslimur í Havn*



Á býráðsfundinum í kvøld, hóskvøldið 23. oktober, fer undirritaða at seta Jan Christiansen, borgarstjóra, soljóðandi fyrispurningar, ið allir snúgva seg um barnaansingina í Tórshavnar kommunu:

1. Hvussu nógv børn standa á bíðilistanum á barnagarðsøkinum?
2. Nær verður barnagarðstørvurin í kommununi væntandi nøktaður?
3. Hvussu er/verður aldurs- og kynsbýtið á barnagarðsøkinum?
4. Hvussu er við frítíðarskúlum? Eru ætlanir um at víðka hann til eisini at umfata 2. og møguliga 3. flokk?

1) Sambært Trivnaðarstjóranum í kunnandi teldubrævið tann 26. mars 2003, vóru 221 børn á bíðilistanum til barnagarðsøkið í kommununi tann 13. mars 2003.
Fyri stuttum frætti undirritaða um barn, sum nýliga er uppskrivað á bíðilistan. At viðkomandi hevur fingið brævfrá Snarskivuni, har upplýst verður, at barnið stendur oman fyri nr. 500. Um hetta er rætt, so má eg spyrja, hvussu tað ber til, at bíðilistin veksur so nógv upp á so stutta tíð? Um hetta ikki er rætt, er so nakað galið við uppskrivingarskipanini?

2) Tað hevur fleiri ferðir verið upplýst, at barnagarðstørvurin verður nøktaður í 2004! Sambært fyrr nevnda skrivi frá trivnaðarstjóranum verða 242 fleiri pláss komandi ár. Hesi pláss nøkta ikki tørvin, um so er at bíðilistin í dag er omanfyri 500 børn. Hvørjar ætlanir eru um at loysa trupulleikan, um tey ætlaðu plássini ikki eru nøktandi.

3) Sum støðan er nú, koma børnini á stovn sambært nummarinum á bíðilistanum. Stovnurin hevur als ongan møguleika at ávirka kyns- og aldursbýtið á stovninum ella stovuni. Hetta hevur sera óhepnar avleiðingar við sær, eitt nú at børn, ið hava aldur til vøggustovu mugu flyta upp í barnagarðarnar. Ella umvent, at eitt barn, sum av røttum skuldi farið í barnagarð, noyðist at halda fram í vøggustovuni, tí pláss ikki er í barnagarðinum. Eitt vøggustovupláss kostar foreldrunum munandi meira enn eitt barnagarðspláss, so tað hevur eisini fíggjarligar fylgjur við sær.

4) Í álitinum »Børn og ung í Tórshavnar kommunu« frá 1996, ið er samtykt av býráðnum, stendur: »…at Frítíðarskúlin skal víðkast til eisini at fevna um 2. og 3. flokk, samstundis sum hann fær hóskandi karmar at virka undir«. Ætlar borgarstjórin at fylgja hesi samtykt? Um so er, at ætlanin er at fylgja samtyktini, hvussu langt eru ætlanirnar so komnar?

*At enda skal eg gera vart við, at tá ið eg brúki orðingina »barnagarðsøkið«, so umfatar tað alt ansingarøkið t. v. s. dagrøkt, vøggustovur og barnagarðar.*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## UTTAN ÚR HEIMI

# Ongar myndir av kistum við deyðum hermonnum

**George W. Bush, forseti, hevur sett amerikonskum fjølmiðlum bann fyri at vísa myndir av kistum við hermonnum, sum doyggja í Irak.**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dl*

Boðini eru ikki nýggj, tí sambært Washington Post sendi forsetin longu í mars øllum amerikonskum herstøðum boð um serligar mannagongdir í sambandi við kríggið í Irak.

Í boðunum gjørdi forsetin millum annað greitt, at fjølmiðlarnir skuldu ikki fáa atgongd til amerikonsku herstøðina Ramstein í Týsklandi, hagar kistur við deyðum amerikonskum hermonnum vanliga verða fluttar, áðrenn tær verða sendar til Dover-herstøðina í statinum Delaware. Í boðunum stóð eisini, at fjølmiðlarnir skuldu heldur ikki sleppa á Dover-støðina, tá kisturnar koma hagar. Á Dover-støðini er tann størsti hernannakirkjugarðurin í USA.

Atfinningarsamar røddir leggja Bush-stjórnina undir at fjala sannleikan um kríggið í Irak við at nokta almenninginum at síggja tær flaggskríddu kisturnar, sum hvørja viku koma til USA. Millum tey atfinningarsomu er talsmaðurin hjá fyrrverandi forsetanum Bill Clinton.

Joe Lockhart sigur við Washington Post, at tað er skeivt av stjórnini at dylja sannleikan um tað, sum hendir í Irak. Hann vísir á, at vanliga var Bill Clinton hjástaddur, tá amerikanskir hermenn komu heim í kistu, og tað vóru fjølmiðlarnir eisini, sigur hann.

# Seinasta Concorde-ferðin



*Í dag er seinasti dagur hjá Concorde-flogførunum*

**Eitt serligt tíðarskeið í flogsøguni fær enda í dag, tá tað seinasta Concorde-flogfarið lendir fyri seinastu ferð.**

FLOGFERÐSLA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað bretsk-franska Concorde-flogfarið fer í søguna í dag, tí nú verður tað seinasta flogfarið av hesum slagnum tikið úr flúgving og sett.

Concorde-flogfarið var ein kollvelting innan ferðamannaflúgving, tá tað fyrsta fór í flúgving, og tað vóru tey, sum væntaðu, at altjóða flogfeløgini fóru at standa í røð at fáa fatur á hesum skjótu flogførunum. Tey mest bjartskygdu væntaðu, at feløgini fóru at bíleggja eini 500 Concordeflogfør, onnur væntaðu umleið 200, men tá saman um kom, gjørdist talið 14, sjey til British Airways og sjey til Air France.

Avmarkaðir rutumøguleikar, stór orkunýtsla og nógvur gangur, tá flogførini brutu ljóðmúrin, hava gjørt, at Concorde-flogfarið ongantíð fekk fótin fyri seg. Vanlukkan uttan fyri París og marknaðarkreftirnar góvu at enda flogfarinum mønustingin. Fyrr var tað stuttligt at ferðast skjótt. Nú er tað bara dýrt.

### Hvar eru oljupengarnir?

Júst sum tey sonevndu gevaralondini hittast í Madrid at taka støðu til fíggjarliga hjálp til at endurbyggja Irak, hevur felagsskapurin Christian Aid reist spurningin, hvat er vorðið av pengunum, sum Irak hevur fingið fyri oljuna, sum landið hevur útflutt, síðani stýrið hjá Saddam Hussein fall.

Christian Aid hevur við upplýsingum úr Irak og ST roknað út, at Irak hevur útflutt olju fyri millum 25 og 32 milliardir krónur, síðani amerikanarar og bretar hersettu landið. Felagsskapurin sigur, at hóast amerikanarar og aðrir tosa um demokrati í Irak, veit eingin at siga, hvat er vorðið av pengunum. Christian Aid vísir eisini á, at sambært altjóða reglum eigur amerikanska umsitingin í Irak at greiða frá, hvat pengarnir eru nýttir til, men tað hevur hon ikki gjørt.

Felagsskapurin heldur, at gevaralondini eiga at krevja eina frágreiðing frá amerikanarum um, hvat er vorðið av pengunum, áðrenn tey ganga við til at fíggja arbeiðið at endurbyggja Irak.

### Sita fangar í Norðurkorea

Ein fyrrverandi norðurkoreanskur heryvirmaður vil vera við, at hann fyri sjey árum síðani sá sjey vesturlendskar fangar í Norðurkorea. Menninir, sum sóu út til at vera millum 70 og 75 ára gamlir, sótu í einari fangalegu. Hann fekk at vita, at menninir høvdu verið fangar síðani kríggið í Korea fyrst í fimmti-árunum.

Kim Yong var sjálvur fangi í leguni, men tað eydnaðist honum at flýggja úr Norðurkorea, og síðani hevur hann búð í USA. Hann hevur nú greitt einum amerikonskum mannarættindafelagsskapi, sum júst hevur almannakunngjørt eina frágreiðing um politiskar fangalegur í Norðurkorea.

Tað er ein fyrrverandi ST-embætismaður, David Hawk, sum hevur skrivað frágreiðingina. Hann vil vera við, at millum 150.000 og 200.000 politiskir fangar sita í norðurkoreonskum fangalegum. Norðurkoreonsku myndugleikarnir hava alla tíðina avsannað, at legurnar eru til.

### Aftur ófriður

Nú er aftur ófriðarligt í afrikanska landinum Nigeria.

Keldur í landinum siga, at minst fýra fólk hava latið lív í samanbrestum í tí oljuríka landspartinum Warri teir seinastu dagarnar. Samanbrestirnir vóru millum tveir ættarbólkar, og stjórnarherurin noyddist at leggja uppí, siga keldurnar.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at ættarbólkarnir í Warri bresta saman. Í mars var ófriðurin so ringur, at oljufeløgini Shell, ChevronTexaco og Total noyddust at gevast við sínum virksemi í landspartinum, og feløgini hava boðað frá, at fyribils fara tey ikki at taka virksemið uppaftur. Ófriðurin í mars hevði við sær, at nigeriski oljuútflutningurin minkaði næstan 40 prosent. Harafturat er framleiðslan nú tíggju prosent minni, enn hon kundi verið.

### Full ferð á Volvo

Tað gongur strúkandi hjá svensku bilverksmiðjuni Volvo. Felagið hevur júst almannakunngjørt roknskapin fyri níggju teir fyrstu mánaðarnar í ár, og har sæst, at felagið hevði 3,2 milliardir svenskar krónur í avlopi hetta tíðarskeiðið. Somu mánaðir í fjør var avlopið 755 milliónir svenskar krónur.

Ein stór orsøk til tað góða úrslitið er, at felagið hevur framt munandi sparingar á lastbiladeildini, men felagið hevur eisini selt fleiri bilar. Tað eru serliga lastbilarnir av sløgunum Volvo, Mack og Renault, sum eru væl umtóktir, men tann nýggi Volvo CE hevur eisini selt væl.

Stjórin í Volvo, Leif Johansson, sigur seg hava góðar vónir um framtíðina hjá fyritøkuni. Hann vísir millum annað á, at eftirspurningurin eftir Volvo-bilum vaks ikki minni enn 46 prosent í juli ársfjórðingi.